Eydna Skaale eydnaskaale@hotmail.com

# Mótaprei
# ... og eina stóra SLOYFU um!

Eitt av mótarákunum í vetur dyrkar tað kvinnuliga og vakra. Vit síggja blondur, flesar, silki, chiffon, stilettir og reyðar varrar. Men tað, sum gongur aftur hjá øllum sniðgevunum, sum stýra feminina rákinum, eru sloyfurnar. Í vetur er tað nevniliga sloyfan, sum er tann famøsi prikkurin yvir i'num. Nýt sloyfur frá topp til tá og frá innast til uttast – til jólaborðhaldið er sloyfan eitt mást




Plateau stilettir úr lakki og leðri við peeptoe og eini stórari sloyfu framman frá danska skógvasniðgevanum Carla F. www.carlaf.dk



Mótin við hárboylunum, sum hevur verið at sæð í fleiri kollektiónum á rað, heldur fram í vetur. Men tað, sum serliga er at síggja nú, eru hárboylar við sloyfu á. Her er ein pinklittur frá nethandlinum www.asos.com



Lady Gaga hevur eina sloyfu úr følskum hári, sum sær út sum hennara egna. Um hárið er nóg langt ber tó til at gera eina sloyfu úr tínum egna hári, og ein vegleiðing sæst á www.plagg.fo



**Sjálvandi er tann lítli svarti kjólin eisini pyntaður við eini stórari sloyfu í vetur. Hesin er frá Hennes & Mauritz**



Eisini smúkkurnar hava fingið íblástur frá sloyfunum. Her er eitt par av gyltum oyrastikkarum frá danska gullsmiðinum Susanne Friis Bjørner. www.susannefriisbjorner.dk





Lítil hondtaska við stórari sloyfu frá merkinum Pieces.





Dolce & Gabbana eru heitir forsprákarar fyri feminina rákinum, her við einum setti úr vetrarkollektiónini 2010. Tunt, flákrandi toy, flesar og ein stór sloyfa um hálsin.

Hendan myndin er frá heyst/vetrar sýningini hjá Chloé, og aftur her sæst feminina rákið við mjúkum, tunnum toyi, húðlitta litinum og sloyfum bæði um miðjuna og um hálsin.

Tað ber eisni til at nýta sloyfur, uttan at øll skulu vita tað. Bæði undirklæði og nylonsokkar, serliga stay ups, eru pyntaðir við fittum sloyfum. Hesi bæði pørini eru frá www.temashop.dk